gult cyan magenta svart

Sama søgan hvørja ferð

5–mannafør: *Nýggju bátarnir eru so sannførandi, sum tað sjáldan áður hevur verið at sæð*

Leygarkvøldini í Miðvági og í Runavík líkjast nógv nú í summar. Hvørja ferð tað er kappróður verður skipað fyri móttøku fyri manningunum á ávikavíst Frúnni og Tjaldrinum. Sigrarnir í Kollafirði vóru eins sannførandi, sum teir hava verið undanfarnu ferðirnar, og tað sær ikki øðrvísi út, enn at tey kunnu fara at smyrja breyð og leggja til rættis longu fyrrapartin, tá tað annan leygardag fer at verða kappast í Vestmanna.

Á Kollafirði vóru fleiri framvið í startinum bæði hjá gentunum og dreingjunum, men tað var heilt skjótt, at Frúgvin og Tjaldrið høvdu funnið sítt pláss, um tað ber til at siga tað soleiðis, og á málinum vóru bátslongdirnar fleiri aftur til næstu bátarnar.

Tjaldrið var 5.20 sekund fyrri enn Havfrúgvin á mál, og Frúgvin var heili 9.10 sekund fyrri enn Hvassi á mál.

Vestmannadreingir vunnu FM í fjør. Teir hava róð væl higartil í ár. Teir hava verið næstfremstir hvørja ferð burtursæð frá á norðoyarstevnu, tá teir vóru nummar trý. Men sjálvt um teir hava róð væl, so mugu teir – sum øll onnur – staðfesta, at tað tykist vera nakað heilt serligt at rógva í nýggjum báti. Í fjør vóru tað vestmannadreingir, sum sólaðu sær umborð á nýggjari Havfrúgv. Í ár stríðast teir fyri at vinna silvurplássið.

Tjaldrið vann kappróðurin hjá fimm-mannaførum dreingir

Annan leygardag fáa vestmannadreingir ein nýggjan møguleika í heimasjógvi. Men á Kollafirði vóru ábendingarnar ikki serliga stórar um, at tað fer at eydnast at fanga Tjaldrið.

Stýrdu betri

Í Vági fingu tær umborð á Frúnni gula kortið, tí tær ikki hildu seg á kósini. Á Kollafirði gekk betur hjá miðvágsgentum.

Mest merkisverda í róðrinum hesa ferð var, at Ørnin úr Sandavági heilkiksaði. Næstfremsti báturin í FM kappingini fekk ein góðan start. Tað fekk Beinta úr Miðvági, sum var næstfremst á norðoyarstevnu, men sum tað síðani hevur gingið heilt illa hjá, eisini. Men hjá báðum vágabátunum hilnaðist tað illa longri inni á fjørðinum. Tær fóru niður í ferð, endaðu aftarlaga, og harvið var Frúgvin einsamøll um at verja stoltleikan hjá Vágunum.

Beinta fekk gult kort fyri at stýra skeivt. Tað fekk Hvssi av Oyri eisini, men genturnar í Sundalagnum megnaðu kortini at vinna næstfremsta plássið. Tað gjørdu tær í stórari kapping við Tjaldrið og Drekan. Tað var ikki leyst millum hesar bátarnar.

jh

Frúgvin og Argjabáturin vinna ferðina av landinum

Kappróður: *Eingin nýggjur vinnari var á Kollafirði, og tískil er longu nú so gott sum greitt, hvørjir fýra teir fyrstu FM vinnararnir verða*

Tað eru tveir FM kappróðrar eftir. Í teoriini ber tað til, at onkur av bátunum, sum liggur væl fyri, ikki fær luttikið ella ikki kemur á mál í øðrum av kappingunum, sum eru eftir, men í veruleikanum hongur tað soleiðis saman, at í fýra av teimum seks kappingunum er tað longu nú greitt, hvør fer at vinna FM.

Dreingirnir umborð á Tjaldrinum, genturnar umborð á Frúnni, kvinnurnar umborð á Jarnbardi og menninir umborð á Argjabátinum hava vunnið allar kappingarnar.

Frúgvin skal í tveimum róðrum bara hava eitt stig (og kanska einki), áðrenn vágagenturnar í Miðvágs bátinum kunnu kalla seg meistarar, og kvinnurnar umborð á Jarnbardi skulu í mesta lagið hava tvey stig, áðrenn eingin á nakran hátt kann røkka teimum.

Felags fyri báðar tær omanfyri nevndu manningarnar er, at tær hava verið so sannførandi í kappingunum higartil, at tað er sera torført at rokna við nakrari hóttan móti teimum.

Í kappingini millum 8–mannaførini og í kappingini millum dreingjabátarnar hava teir næstmestu verið støðugari. Men um Tjaldrið og Argjabáturin vinna í Vestmanna annan leygardag, so eru eisini hesar manningarnar FM vinnarar.

Lítil ivi

Umframt FM kappingina verður eisini kappast um, hvørjar kvinnur og hvørjir menn komandi vár skulu fáa møguleikan at royna seg á Scillyoyggjunum. Hjá kvinnunum stendur kappingin millum genturnar umborð á Frúnni og kvinnurnar umborð á Jarnbardi. Um báðir bátarnir vinna í Vestmanna og á ólavsøku, og um einki heilt óvanligt fer at taka seg upp, so verða tað genturnar á Frúnni, sum fáa tilboðið um ferðina uttanlands.

Báðir bátarnir hava fult stigatal. Tískil er tað samlaði munurin aftur til næstfremstu bátarnar, sum er avgerandi, og har er Frúgvin betri fyri. Í teimum fýra róðrunum, sum hava verið higartil, hava tær tilsaman róð 41.14 sekund skjótari enn næstfremstu bátarnir. Jarnbardur hevur róð 21.01 sekund skjótari enn næstfremstu 6–mannaførini við kvinnum.

Dreingirnir umborð á Tjaldrinum hava so at siga kvalifiserað seg til róðrarferðina niður til Sorø seinni í ár, og manningin umborð á Argjabátinum liggur nógv best fyri í kappingini um tilboðið at fara niður á Scillyoyggjarnar komandi ár. Argjabáturin hevur 28 stig. Størstu kappingina fáa argjamenn frá 6–mannafarinum Hvessingi, sum hevur 24 stig, og 10–mannaførunum Vestmenningi og Nólsoyingi, sum hava 22 stig.

jh

Vestmenningur alla tíðina fremstur

Kappróður: Hóast teir høvdu verið og vant á Kollafirði, so kostaði tað Havnarbátinum, at teir ikki megnaðu at stýra nóg neyvt

Eftir at nólsoyingar høvdu átt fremsta plássið bæði í Runavík og í Vági, vóru tað vestmenningar, ið endaðu fremstir á Kollafirði. Teir vunnu í Klaksvík, men bæði í Runavík og í Vági noyddust teir at finna seg í, at bæði Nólsoyingurin og Havnarbáturin lógu á teimum.

Vestmenningurin fekk ein góðan start, teir róðu sera støðugt, og á málinum vóru teir eina stóra hálva bátslongd frammanfyri Havnarbátin, sum aftur var eina stóra hálva bátslong frammanfyri Nólsoyingin.

Kjølur, sum ikki hevur vant serliga nógv enn og sum var kolldømdur beint undan róðrinum í Vági, vann kappingina móti Eysturoyingi um at sleppa undan aftasta plássinum.

Eysturoyingar tóktust mest sum geva skarvin heilt yvir, tá tað var teimum greitt, at teir heldur ikki hesa ferð høvdu nakað at gera í kappingini um fremsta plássið. Aftasta plássið hjá Eysturoyinginum var ivaleyst endaliga staðfestingin av, at hesa ferð er kappróðrarárið hjá sannførandi FM vinnaranum bæði í fjør og í fyrraárið fullkomuliga miseydnað.

Jens Pauli Wilhelmsen róðursmaður á Vestmenningi var sera fegin fyri steypini

Sami munur

Bátsformaðurin á Vestmenningi, Jan Johannesen, heldur, at talan var um spennandi og harða kapping, men hann heldur ikki, at teir nakra løtuna mistu fremsta plássið:

– Tá tú sjálvur rørt, og tað er tætt millum bátarnar, so sært tú ikki hinar. Tað er róðursmaðurin, sum hevur skil á hasum. Hann læt alla tíðina væl at, men vit vóru kortini ikki meiri tryggir enn so, at vit vildu hava dómarabátin at vátta sigurin fyri okkum, áðrenn vit vildu leypa upp í bátinum. Okkara róðursmaður legði seg skjótt eftir, at tað tóktist sum um Havnarbáturin var meiri vandamikil enn Nólsoyingurin, og tað var heppið fyri okkum, at stýrimaðurin hevði eitt vakið eyga við tí kappingini.

Tit hava betri start nú, enn tit plaga at hava?

– Eg vil siga tað soleiðis, at nú hevur starturin, sum vit royna undir yvirskipaðu venjing, vælkomin í kappingini. Áður er tað fleiri ferðir komið fyri, at hann ikki hevur eydnast so væl. At tað gongur væl í startinum hevur sera stóran týdning.

Hugdu skeivan veg

Bátsformaðurin á Vestmenningi undrast eitt sindur yvir, at innaru ella norðaru bátarnir fóru so langt frá teimum:

– Teir flestu okkara hava róð á Kollafirði fyrr. Vit kannaðu umstøðurnar enn eina ferð. Stýrimaðurin hevði eitt stavnhald at stýra eftir, og sjálvt um sólin stóð soleiðis, at tað ikki var so lætt at síggja, so gekk tað væl. Um tú skalt hugsa um at vinna, so er tað týdningarmikið at stýra rætt.

Jan Johannesen heldur ikki, at fjarstøðan til Havnarbátin og Nólsoyingin var so stór fyrrapartin av róðrarteininum, men har er bátsformaðurin á Havnarbátinum, Magni Brøðraberg, ikki heilt samdur:

– Vit halda, at tað gekk ov nógv á stýriborð mest sum allan vegin. Bæði hjá okkum og hjá Nólsoyinginum. Aftaná halda vit, at vit hava ansað ov nógv eftir Nólsoyinginum og ov lítið eftir Vestmenninginum, sum stýrdi neyvt og beint og var einar hálvt hundrað metrar sunnanfyri okkum, tá vit komu á málið.

Men tað kostar ikki at rógva styttsta teinin millum startmálið og endamálið?

– Tað kanst tú ætla, og vit eru sera harmir um, at vit hava spilt okkum eitt sindur burtur, tí munurin var ikki so stórur.

Fyrireikaðu tit tykkum ikki nóg væl?

– Tað hildu vit okkum gera, men úrslitið vísti tað ikki. Vit vandu á Kollafirði í fleiri kvøld undan stevnuni, men vit mugu bara staðfesta, at tað er øðrvísi at venja og at kapprógva. Vit hava verið ov spentir og hava hugsað ov lítið um okkara geira og vestmenningarnar og ov nógv um nólsoyingarnar, sigur Magni Brøðraberg, sum ikki hevur mist mótið um, at tað fer at eydnast Havnarbátinum at vinna í ár:

– Tað eru tveir róðrar eftir. Um vit vinna báðar, so verða vit meistarar, og so fer árið í søguna sum eitt gott ár hjá okkum. Higartil hava vit bara verið næstfremstir, munurin hevur verið lítil, og nú ætla vit, at marginalirnir skulu verða í parti við okkum tvær tær síðstu ferðirnar!

jh

Kappróður á Sundalagsstevnu

Úrslit frá kappróðrinum á Sundalagsstevnu

5 - mannafør dreingir

Nr	Bátur	Tíð	Stig	Samlað
1	Tjaldrið	05:09:00	7	28
2	Havfrúgvin	05:14:20	5	19
3	Kollur	05:19:12	4	16
4	Drekin	05:19:17	3	14
5	Royndin Fríða	05:22:10	2	6
6	Spógvin	05:22:21	1	2
7	Sílið	05:27:08	0	4
8	Báran	05:31:13	0	0
9	Blikur	05:32:16	0	0
10	Junkarin	05:35:06	0	0

6 - mannafør kvinnur

Nr	Bátur	Tíð	Stig	Samlað
1	Jarnbardur	05:26:15	7	28
2	Hvessingur	05:32:06	5	16
3	Gongurálvur	05:33:04	4	14
4	Fuglfirðingur	05:38:00	3	13
5	Lómur	05:42:06	2	3
6	Kollfirðingur	05:44:12	1	1
7	Riddarin	05:44:14	0	1
8	Páll Fangi	05:47:20	0	9
9	Sólmundur	05:48:10	0	3

5 - mannafør gentur

Nr	Bátur	Tíð	Stig	Samlað
1	Frúgvin	05:31:10	7	28
2	Hvassi 1g	05:40:20	5	13
3	Tjaldrið	05:42:12	4	11
4	Drekin	05:44:13	3	12
5	Ørnin	05:44:18	2	15
6	Havfrúgvin	05:46:07	1	2
7	Beinta 1g	05:47:07	0	5
8	Sílið	05:48:05	0	2
9	Blikur	05:52:04	0	0
10	Súlan	05:55:10	0	0
11	Spógvin	05:56:12	0	0
12	Bylgjan	06:00:15	0	0
13	Dúgvan	06:04:14	0	0
14	Junkarin	06:12:04	0	0
15	Kollur	06:15:11	0	0

6 - mannafør menn

Nr	Bátur	Tíð	Stig	Samlað
1	Strálan 1g	07:41:04	7	21
2	Hvessingur	07:41:20	5	24
3	Gongurálvur	07:45:16	4	9
4	Hósvíkingur	07:45:23	3	16
5	Kollfirðingur	07:51:05	2	11
6	Sólmundur	07:52:18	1	6

8 - mannafør

Nr	Bátur	Tíð	Stig	Samlað
1	Argjabáturin	07:20:17	7	28
2	Toftabáturin	07:26:07	5	20
3	Nevið Reyða	07:27:00	4	15
4	Gullbrandur	07:27:15	3	13
5	Húsavíkingur	07:29:14	2	6
6	Heiðabáturin	07:36:08	1	1
7	Oyndri	07:36:19	0	2
8	Kvívíkingur	07:40:00	0	1
9	Miðvingur	07:45:08	0	2
10	Sjóriddarin	07:48:18	0	0
11	Víkarbáturin	07:48:20	0	0
12	Knørrur	07:53:14	0	0
13	Ørvur	07:57:10	0	0

10 - mannafør

Nr	Bátur	Tíð	Stig	Samlað
1	Vestmenningur	09:18:00	7	22
2	Havnarbáturin	09:20:10	5	20
3	Nólsoyingur	09:22:15	4	22
4	Kjølur	09:28:08	3	4
5	Eysturoyingur	09:30:06	2	11

sosialurin
Altið fyrst við
www.sosialurin.fo